## ÚTBJÓÐING

Við hesum verður boðið út í almennari lisitatión í høvuðsentreprisu bygging av nýggjum dagstovni og frítíðaskúla í Kvívík.

**Høvuðsarbeiðstøkan umfatar:**
1. Jørðarbeiði
2. Kloakkarbeiði og installatiónir
3. Betongarbeiði
4. Timbur- og snikkaraarbeiði
5. HVS og ventilatión
6. Múraraarbeiði
7. Málaraarbeiði
8. Golvalegging
9. El-inleggingararbeiði

Bílegging av útbjoðingartilfarinum er í seinasta lagi **31. juli 2008.**

Tilfarið verður latið teimum bjóðandi digitalt móti einum veðhaldi kr. 5.000, ið skal flytast á konto hja Kvívíkar kommunu í peningastovni.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjoðingartilfarið er latið inn aftur til kommununa í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina, í sama standi sum tað varð útflyggjað.

Lisitatiónin er ásett av verða **hosdagin 4. september 2008 kl. 15:00** á kommunuskrivstovuni.

**KVÍVÍKAR KOMMUNA**
**Víkarvegur 4 • FO-340 Kvívík**
**Tlf. 421294 • e-mail: kvivik@kvivik.fo**

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 svovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

**PE**

**Sóknast eftir starvsfólki til handil okkara í miðbýnum at arbeiða um kvøldið.**

**Send eina umsókn til PE, Heykavegur 2, 110 Tórshavn**

***PE tí tað lønar seg***

**FUGLAFJARÐAR KOMMUNA**

## NÁMSFRØÐINGUR SØKIST

**Av tí at ov fáar umsóknir vóru, til starvið í Frítíðarskúlanum »Kambur«, at byrja 11. august 2008, endurlýsa vit starvið.**

Eftir summarsteðgin fer frítíðarskúlin at økja um virksemi sítt, við at taka nøkur 6 ára gomul børn inn og veita teimum eitt serligt tilboð.

Vit fara tí at hava brúk fyri tær.

**Vit sóknast** einum námsfrøðingi, ið hevur dirvið at seta dagsskránna, bæði fyri tey 6 ára gomlu og frítíðarskúlabørnini. Vit vænta tí at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert ja-lig/ur, dugir at samstarva, tekur ábyrgd og dugir at seta tær mál.

**Vit bjóða** eitt spennandi starv, ið støðugt er í menning, har tú kanst verða við at mynda og seta tín dám á stovnin. "Kambur" liggur í einum náttúruríkum umhvørvið, har ið náttúran náttúrliga setur sín dám á gerandisdagin.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 40 tímar um vikuna, við møguleikanum fyri niðursettari arbeiðstíð.

Starvið verður sett frá 11. august 2008.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Lønarstig 11-18. Arbeiðstíð, mánadag til fríggjadag 07.30 – 17.15.

Um eingin námsfrøðingur søkir verður hjálparfólk sett fyribils.

Skrivlig umsókn skal verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 01. august 2008 kl. 12.

Fuglafjarðar kommuna
Norður í Gerði 10b
FO-530 Fuglafjørður

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow, leiðari, telefon 73 77 91.

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá 21. juli 2008.

Opið verður aftur 11. august 2008.

HANSEN & THOMASSEN
ADVOKATFIRMA

Bryggjubakki 22 · Postsmoga 106 · 110 Tórshavn
tel: (+) 298 359595 · fax: (+) 298 359596
advokat@advokat.fo · www.advokat.fo

**Annfinn V. Hansen, adv. (H)**
annfinn@advokat.fo

**Djóni Thomassen, adv. LL.M.**
djoni@advokat.fo

**Rannvá Ragnarsdóttir, adv. mediator**
rannva@advokat.fo

**Jens Andrias Vinther, adv.**
jav@advokat.fo

VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Stjóri fyri Føroya Altjóða Skipaskrá og Skráseting Føroya

Tú er ein kreativur leiðari, sum dámar at skapa, fyrisita, samskifta og samskipa, og tú hevur tev fyri marknaðarføring.

Í sambandi við at Skráseting Føroya og Føroyska Altjóða Skipaskrásetingin verða løgd saman í ein nýggjan vinnustovn, søkir Vinnumálaráðið stjóra til nýggja stovnin.

Dámar tær avbjóðingar, átti tú at søkt sera spennandi starvið sum stjóri á nýggjum stovni undir Vinnumálaráðnum.

**Starvið**
Stjórin skal uppbyggja nýggja stovnin og vera við til at skapa karmar fyri vinnuna á økinum, hava ábyrgd fyri umsitingini av vinnulógunum og fremjanini av eftirlitinum og av marknaðarføringini av Føroysku Altjóða Skipaskránni.

Nýggi stovnurin fer at virka sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi lóggávu og vinnupolitikki landsins á økinum, og høvuðsuppgávurnar sambært hesum verða:

- At umsita vinnulógirnar – vinnufelagalógirnar og ársroknskaparlógina
- At umsita lógina fyri Føroysku Altjóða Skipaskránna
- At marknaðarføra Føroysku Altjóða Skipaskránna

**Førleikar**
Tú hevur hóskandi útbúgving á kandidatstøði, og tað er ein fyrimunur, um tú hevur loyst líknandi uppgávur í verki annaðhvørt í privata vinnulívinum ella í almennu umsitingini; men tað er eingin treyt.

Vit vænta, at tú hevur sterkar persónligar eginleikar, so sum arbeiðssemi, dynamikk, leiðaraevni og skapanarlyndi, og tú kennir til føroyska vinnu sum heild. Tú dugir væl við fólki, samskiftir skilliga bæði á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli og hevur evni og vilja at skapa eitt stimbrandi umhvørvi.

**Vit bjóða**
Starvið sum stjóri á nýggja stovninum er sera spennandi og avbjóðandi. Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki í sáttmálanum millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 4. august 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu sendast til:

Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
Tinganes
110 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Arna Poulsen á telefon 556070.